Koppaðu í jollu:

# – Tað var ein skelkur

**Seinnapartin fríggjadagin fóru tríggir hálvvaksnir dreingir á bláman, tá jollan, teir sigldu í, holvdist útfyri Lopransfirði. Skaðið kundið staðist av, men hegni og hepni gjørdi, at allir sluppu uppá kjølin at sita og so var bert at bíta kuldan í seg og bíða eftir bjargingini**

Á SJÓNUM
*Dagfinn Olsen*

Fríggjadagurin kundi verið skaðadagur í Vági, men hegni og hepni vildi tað øðrvísi. Men ein skelk fingu teir tríggir ungu vágbingarnir, sum í jollu koppaðu útfyri Lopransfirði.

Tað var um 16 tíðina fríggjadagin, at óhappið hendi. Teir tríggir sigldu í jollu, sum so ofta áður. Ætlanin var at fara til Víkarbyrgis, hóast tað kann tykjast heldur langt í so lítlum fari.



*Henda 16 fót jollan holvdist, tá tríggir drongir sigldu í henni og í spølni sigldu móti aldunum. Hepni og hegni gjørdi, at allir komu sær upp á kjølin, eftir at hava roynt at fáa jolluna á rættkjøl aftur*

### Í spølni

Men útfyri Núpinum við Lopransfjørð sigldu teir í spølni móti aldunum. Veðrið var hampuligt, men ikki heilt stilt í sjónum.

Tá teir so skulu skifta pláss á lítla farinum, eru teir allir í somu síðu eina stund, og tá kemur ein alda og gevur síðsta skumpið, so jollan holvdist.

- Vit fingu fatur á jolluni beinanvegin og royndu tvær ferðir at fáa hana á rættkjøl, men tað eydnaðist ikki, sigur eini drongurin, ið vit hava prátað við.

Í óeydnuni má sigast, at eydnan var við. Allir eru góðir svimjarar og tað eydnaðist øllum trimum at koma upp á kjølin at sita. Allir vóru hjá jolluni og høvdu fatur og ongin teirra var í vanda fyri at koma burturfrá. Vandi var ongantíð á ferð í so máta.

### Fingu skelk

So sótu teir á kjølinum á lítla farinum og roynduat vinka til bilar. Men tá ein góð løta var farin sóu fólk á Nesi í Vági dreingirnar og skjóttgangandi bátur fór eftir teimum og bjargaði teimum, eftir at teir høvdu bíðað í á leið ein hálvan tíma.

- Vit vóru kaldir og vátir. Og sjálvandi hava vit fingið ein skelk, sigur eini drongurin, vit hava prátað við.

Torur tú í bát aftur og hvat siga foreldur og onnur?

- Tað tekur tíð at koma fyri seg aftur eftir slíkan skelk, men eg tori í bát aftur, men kanska ikki beint nú. Foreldrini royna alla tíðina at spyrja hvussu eg havi tað og slíkt, men eg eri komin yvir tað, sigur drongurin.

Tað var eina 16 fót glastrevjabátur, ein jolla, sum drongirnir sigldu í. Eini av drongjunum eigur jolluna.

Samanumtikið er drongurin, vit práta við, fegin um, at tað spældi so væl av, tí vannlukka kundið staðist av og eitt undur er tað, at allir komu sær uppá kjølin at sita.

- Allir duga at svimja, sigur drongurin lítillátin.



*Jollan liggur við bryggju í Vági og drongirnir hava tað gott, men hava tó ikki hug at lata seg avmynda í jolluni*

# Skuldsettir fyri neyðtøku

**Tveir italiumenn eru skuldsettir fyri neyðtøku og neyðtøkuroynd á eina 15 ára gamla norska gentu**

NEYÐTØKA
*Ingrid Bjarnastein*

Leygardagin fekk løgreglan í Havn fráboðan um eina neyðtøku. Ein fimtan ára gomul norsk genta segði seg vera neyðtikna av tveimum monnum.

Eftir nærri kanningar vísti tað seg, at talan var um tveir italiumenn, sum eru ávíkavist 20 og 21 ára gamlir, og fekk løgreglan hendur á teir stutt eftir fráboðanina.

Ógerðin er framd á einum gistingarhúsi í Havnini, har eitt sindur av hassji var funnið.

Menninir vóru skuldsettir fyri neyðtøku og neyðtøkuroynd, og eftir grundlógaravhoyringina seinnapartin sunnu-dagin, vóru teir varhaldsfongslaðir í fýra vikur við tí grundgeving, at teir ikki skulu ávirka kanningararbeiðið og tí teir eru útlendingar, og skulu tí ikki hava møguleika at rýma av landinum. Gentan varð eisini avhoyrd í rættinum.

Kriminaldeildin í Havn arbeiðir nú víðari við málinum.

# Koyrdi ávirkaður í stolnum bili

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

**Havn:** Leygarmorgunin varð ein drongur steðgaður í bili í havnargøtum. Tað vísti seg beinanvegin, at drongurin hevði onki koyrikort, tí hann var bert 17 ára gamal. Harumframt var bilurin stolin og drongurin ávirkaður.

Tríggjar skuldsetingar verða reistar ímóti unga manninum, og tað verður fyri stuldur, fyri at koyra uttan koyrikort og fyri at koyra ávirkaður.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu við deyða og jarðarferð okkara kæru móður, vermóður, systur, ommu og langommu

**MORENTSA OLSEN**
**Klaksvík**

Hjartans tøkk til tykkum í Sambýlinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Zarepta.

**Erik, Knút og Finngerð við fam.**




